# Yvirtøkur, privatiseringar og pensjónir ovast á breddanum

**Á ólavsøku varð Løgtingið sett, og Anfinn Kallsberg, løgmaður, ferðaðist aftur, men ikki minst fram í tíðina í árligu ólavsøkurøðu síni. Nú er kjakið um ólavsøkurøðu løgmans júst liðug í Løgtinginum, og sostatt er grundarlagið lagt fyri nýggja politiskum árinum 2003. Vit hava spurt allar floksformenninar, hvat teir væntað av komandi politiska árinum. Allir sum ein nevna teir sjálvsagt fíggjarlógina sum eina høvuðsavbjóðing, men annars tykjast yvirtøkurnar, pensjónsmálið og privatiseringsgongdin at gerast landaplágurnar komandi árið. Hvørji mál vera ovarlaga á breddanum? Hvat ynskja ymsu flokkarnir at seta á dagsskránna? Á hvørjum øki verður torført at finna semjur o.s.fr.?**

Høgni Hoydal:

## Yvirtøkurnar ovast á breddan

**Persónliga vónar formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, at gongd aftur kemur á yvirtøkurnar. Umframt hetta væntar hann eitt aktivt og møguliga eisini turbulent ár við nógvum stórmálum á skránni**

NÝGGJ TINGSETA
*Heini í Skorini*

Formaður Tjóðveldisfloksins fyrireikar seg til eitt ár, har rættiliga nógv prinsipiell mál skulu avgreiðast. Í kjalarvørrinum av Jógvani S málinum fer m.a. stríð væntandi at standa um lógirnar um vinnuligan fiskiskap.

- Slitna og æviga kjakið um økismenning ætla vit okkum eisini at fáa gongd á í nýggju tingsetuni, t.d. við einum samferðslugjaldi, har gjaldið til útjaðaran skal niður. Umframt hetta ætlar Tjóðveldisflokkurin sambært formanninum at berjast ímóti studningi til vinnulívið, sum eisini er eitt prinsipielt mál.



*Høgni Hoydal ætlar at seta yvirtøkurnar ovast á breddan, men umframt hetta eru fleiri onnur stórmál á skránni, t.d. eldraøkið, skúlabygging, økismenning og privatiseringar*

### Yvirtøkurnar í fokus

Við støði í hugsjónarligu ætlanum Tjóðveldisfloksins er ikki óvæntað, at Høgni nevnir yvirtøkurnar sum eitt hjartamál, hann vónar verður sjónligt komandi tíðina.

- Eg vænti og vóni, at vit framhaldandi kunnu yvirtaka málsøki frá donskum hondum, og hetta kann avgjørt koma at skapa yvirskriftirnar komandi ár, sigur Høgni Hoydal.

Sostatt hevur formaðurin í størsta samgonguflokkinum lagt lunnar undir eina framhaldandi sjálvstýriskós í vetur, sum hann vónar verður ferðmiklari og sjónligari enn áður.

### Rumbul um stórmál

Høgni Hoydal vísir víðari á fleiri onnur mál, sum liggja á láni, og sum væntandi koma at seta dagsskránna komandi árið.

- Bygging av miðnámsskúlum er samtykt í Løgtinginum, og tað verður væntandi í fokus. Annars fer eldraøkið sjálvsagt at taka sín part, umframt at stórar avgerðir liggja fyri framman í sambandi við privatiseringar og virðisbrævamarknaðin.

Høgni Hoydal leggur afturat, at hann væntar eitt aktivt og møguliga eisini turbulent ár á politiska pallinum, har hann fyrst og fremst ynskir at fáa ferð á yvirtøkurnar í gongdini fram ímóti einum sjálvstøðugum Føroyum.

Kári p. Højgaard:

## Samgongustevið størsti vandin

**Formaður Sjálvstýrisfloksins metir høvuðsuppgávu samgongunnar í nýggju tingsetuni fyrst og fremst vera betri samgongusamstarv. Umframt hetta verður eitt stórmál at fáa samskipað búskapin í niðurgongutíðum**

NýGGJ TINGSETA
*Heini í Skorini*

Samgongustev samgongunnar hevur flestum kunnugt ikki verið av tí besta síðani 1998. Hetta metir Kári p. Højgaard, formaður Sjálvstýrisfloksins, vera av størstu uppgávunum í nýggju tingsetuni.

- Fyri samlaða arbeiðslagi má samgonguluftin vera reinari, um vit saman skulu megna stóru uppgávurnar, sigur Kári p. Højgaard. Hann metir uppgávuna at fáa samskipa búskapin í soltnum tíðum vera tað størstu og kravmiklastu, meðan fleiri ávís mál eisini liggja á láni.



*Kári p. Højgaard metir eina høvuðsuppgávu vera at betra um samgongusamstarvi í nýggju tingsetuni*

### Lønarmismunur í fiskivinnuni

Fyrst og fremst nevnir Kári, at meðan lønirnar á landi eftir verkfallið eru farnar upp, eru lønirnar á sjógvi, serliga viðvíkjandi partroli, minkaðar í stórum nøgdum. Umframt hetta nevnir hann, at um almennu lønirnar eftir sáttmálasamráðingarnar í vetur fáa eins stóran vøkstur og arbeiðararnir fingu á sinni, verður talan um ov stórar samlaðar lønarútreiðslur fyri landið.

- Sostatt er primera vinna okkara í vanda, við tað at gloppið millum lønir á landi og havi er ov stórt, sigur Kári p. Højgaard, sum leggur afturat, at tað má loysa seg at fara til skips, um fiskivinnan skal bera seg, og tað ger tað ikki í løtuni.

### Útjaðarin betri sømdir

Kári tekur eisini táttin upp við pensjónsøkinum, sum hann metir skal raðfestast høgt í hesi tingsetuni, umhvørvismál, sum skulu setast í fokus, og privatiseringsgongdina, sum eisini er eitt stórmál. Umframt hetta vónar hann, at útoyggjamál eisini verður at síggja á matarlepanum.

- Um útjaðarin skal mennast, skal nógv meiri peningur til. Í løtuni eru bert 300.000 krónur játtaðar, og tað er ein láturliga lítil upphædd, sigur ein avgjørdur Kári p. Højgaard at enda.

Jenis av Rana:

## Vil verja borg á heilsuøkinum

**Formaður Miðflokksins, Jenis av Rana, er hart ímóti niðurskurðinum á fíggjarlógini á almanna- og heilsumálum. - Okkara uppgáva verður m.a. á hesum øki, sigur Jenis av Rana**

NÝGGJ TINGSETA
*Heini í Skorini*

Eins og flestu hinir floksformenninir meta verður fíggjarlógin sambært Jenis av Rana eitt dominerandi mál í komandi árinum, har niðurskurðurin gevir miðflokkinum eina høvuðsuppgávu.

- Niðurskurðurin á 1% á komandi fíggjaróg verður eftir mínum tykki ein vanlagna á almanna- og heilsuøkinum, og júst hesum ætli eg at berjast ímóti, sigur Jenis av Rana.



*Jenis av Rana er atfinnandi mótvegis høvuðsmálunum komandi árið, nevniliga niðurskurðin á fíggjarlógini og ynski samgongunnar um privatisering*

Hann slær fast grundleggjandi ónøgdsemi sítt at fremja hendan niðurskurð, sum í seinasta enda rakar vanliga borgaran.

### Niðurleggja eitt aðalráð

Umframt hetta ynskir Jenis av Rana at fáa almennar sparingar ovarlaga á breddan, m.a. við einum orðaskifti um fyrimunir og vansar at niðurleggja eitt aðalráð.

- Eftir mínum tykki eru ov nógv aðalráð í løtuni, og nógvur peningur kundi verið spardur, um vit bert høvdu eitt minni. Í løtuni eru heili trý aðalmál undir vinnumálum (Vinnumálaráðið, Oljumálaráðið og Fiskimálaráðið), og t.d. kundu vit spart nógv her, sigur Jenis.

Hann vísir víðari á, at Høgni Hoydal t.d. hevur verið landsstýrismaður í bæði stjórnarmálum og mentamálum seinastu tíðina, og hóast hann sjálvsagt ikki hevur kunnað verið heilur í báðum sessum, sigur hetta ikki so lítið um, at vit saktans kundu spart.

### Privatisering loysir ongan trupulleika

Umframt hetta metir Jenis, at privatiseringsynskini eisini vera nógv at hoyra um í vetur.

- Vit brenna ikki fyri at privatisera. Privatiseringar skulu fremjast fyri at loysa ein trupulleika, og eftir mínum tykki er eingin trupulleiki í løtuni, sigur Jenis av Rana.

Hann vísir eins og Jóannes Ejdesgaard á, at í løtuni gongur almenna virksemið væl, og at tað tískil als ikki er nøkur orsøk til privatisering.

- Hvørjaferð góðar tíðir eru, kemur gongd á prátið um privatiseringar, og so skjótt tíðirnar gerast soltnari búskaparliga, noyðist tað almenna at taka yvir. Søgan endurtekur seg, slær formaður Miðfloksins at enda fast, sum sostatt fyrireikar seg til at verja borg á heilsuøkinum komandi árið.

Lisbeth l. Petersen:

## Fíggjarætlanirnar hanga ikki saman

**Lisbeth l. Petersen, forkvinna Sambandsfloksins, metir tað vera ógjørliga at fáa fíggjarligu endarnar at røkka saman, um mótsigandi ætlanir samgongunnar skulu gerast, og hetta verður høvuðsmálið komandi árið**

NÝGGJ TINGSETA
*Heini í Skorini*

- Við støði í løgmansrøðuni og teimum málum, samgongan hevur samtykt í samgonguskjalinum, dugi eg ikki at síggja, hvussu økonomisku endarnir skulu hanga saman, sigur andstøðuleiðarin Lisbeth l. Petersen.

Hon vísir á, at miðskeiðis í niðurgongutíðum, har fíggjarlógin er skerd við einum prosenti, ætlar samgongan at yvirtaka donsk málsøki og fremja meiri og meiri kostnaðarmiklar ætlanir.



*Lisbeth l. Petersen vísir á, at fíggjarætlanir samgongunnar ikki hanga saman*

### Einki samsvar

Uttan at fara inn á fleiri ávís málsøki heldur Lisbeth, at høvuðsuppgáva samgongunnar verður júst hetta at fáa samsvar millum sparingarnar á fíggjarlógini og yvirtøkurnar.

- Tá ásett er, at undirskot ikki skal vera á fíggjarlógini, umframt at fleiri og fleiri kostnaðarmikil øki verða átikin mitt í niðurgongutíðum, er einki samsvar, slær Lisbeth l. Petersen fast.

### Vælferðin seld

Við hesum framferðarhátti heldur Lisbeth l. Petersen, at vælferð fólksins av álvara er komin í vanda.

- Á henda hátt selur samgongan vælferðina, og tað vilja vit ikki ganga við til, tí júst vælferðin er tað virðismiklasta, vit eiga, heldur forkvinna Sambandsfloksins. Hon vísir víðari á, at í kjakinum um løgmansrøðuna royndi hon at spyrja, hvussu sparingar og ovurnýtsla samsvarar í ætlanum samgongunnar, men hesar royndir vóru til fánýtis.

- Eg spurdi í orðaskiftinum í Tinginum, hvussu viðurskiftini skulu hanga saman, men einki ítøkiligt svar varð givið, sigur Lisbeth.

### Trýr ikki uppá pensjónsmálið

Eldraøkið og pensjónsmál hava í longri tíð verið umrødd við jøvnum millumbilum, og fleiri politikarar síggja hetta sum eitt av stóru tøkunum í nýggju tingsetuni. Men jarnkvinnan úr Sambandsflokkinum metir ikki, at hetta mál verður fyri stórvegis broytingum.

- Tað hevur verið prátað og prátað um hetta mál, uttan at ein veruligur politiskur vilji tykist vera til staðar, og í so máta vænti eg ikki, at stórvegis broytingar verða framdar í nýggju tingsetuni, heldur Lisbeth l. Petersen.

Av øðrum málum, sum møguliga verða sjónlig, nevnir Lisbeth at enda sáttmálasamráðingarnar og privatiseringar

Jóannes Ejdesgaard:

## Privatiseringsgongdin fær yvirskriftirnar

**- Fíggjarlógin og privatiseringsynski samgongunnar vera høvuðsmálini komandi árið, eru avgjørdu og konkretu viðmerkingarnar hjá formanni Javnaðarfloksins, Jóannesi Ejdesgaard**

NÝGGJ TINGSETA
*Heini í Skorini*

- Samgongan hevur langt síðani víst, at henni ikki nýtist okkara hjálp at skapa turbulens og ósemjur, so á tí økinum nýtist okkum ikki at hjálpa, eru fyrsta viðmerkingarnar hjá formanni Javnaðarfloksins til spurningin um nýggja politiska árið eftir tingsetuna.

Annars er Jóannes avgjørdur í spáanum sínum um høvuðsmálini í nýggja árinum: 1) fíggjarlógin fyri komandi ár, 2) ynski samgongunnar um privatiseringar



*Jóannes Ejdesgaard vísir á tvey høvuðsmál í komandi árinum, og verður tað fíggjarlógin og privatiseringsætlanir samgongunnar*

### Kenna sviðan á egnum kroppi

Hugsjónarliga stríðið kemur sambært formanni Javnaðarfloksins ongantíð so týðiliga til sjóndar, sum tá fíggjarlógin verður viðgjørd, og tískil kemur tað altíð til skarpskerðingar. Sambært Jóannesi Ejdesgaard fer samgongan í ár at kenna sviðan av egnum gerðum.

- Samgongan hevur víst á niðurskurðin á fíggjarlógini á 1%, meðan Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, sigur hetta vera í minna lagi. Sostatt verður vælferð borgarans sett í vanda, og nú kennir samgongan sviðan av t.d. niðurskurðinum á blokkstuðulinum á umleið 370 mió krónur, sigur Jóannes Ejdesgaard.

Hann vísir víðari á, at síðani 1998 hevur sama samgongan økt almennu útreiðslurnar við 1,1 mia. krónum, og at hetta hevur verið fíggjað við búskaparliga vøkstrinum seinnu árini.

- Tískil er talan um eina nýggja støðu fyri samgonguna, sum ikki hevur kent til niðurgongutíðir fyrr. Teir hava ongantíð upplivað at skula spara, og nú talan ikki er um yvirflóð og vøkstur, kenna teir sviðan á egnum kroppi av egnum gerðum.

### Berjast ímóti privatiseringsætlanunum

Næsta høvuðsmál komandi árið verður sambært Jóannesi Ejdesgaard eisini ynski samgongunnar um privatiseringar av ymsum almennum ognum.

- Tað harmar meg, at eisini Tjóðveldisflokkurin tykist vera farin uppí privatiseringsharkaliðið. Nú samgongan vantar pening og roknistykkið ikki gongur upp, er privatisering ein háttur at vinna pening her og nú, men tað ætlar Javnaðarflokkurin sær at stríðast móti, sigur ein avgjørdur Jóannes Ejdesgaard.

Hann vísir við hesum á búskaparligu endurreisnina eftir kreppuna fyrst í 90´unum, tá tað almenna noyddist at rudda upp eftir privata skilaloysinum, og at viðurskiftini síðani tá hava verið góð.

- T.d. hava Føroya Banki og Føroya Fiskavirking virkað væl undir almenna sektorinum, og hevur tað kastað væl av sær í landskassan. Tískil ætla vit at vera ein mótpolur til privatiseringsrákið, sum væntandi verður annað av høvuðsmálunum komandi árið.

Óli Breckmann:

## Standa saman um yvirtøkurnar

**Í høvuðsheitum fara yvirtøkurnar og eldaøkið at mynda nýggju tingsetuna sambært formanni Fólkafloksins, Óla Breckmann**

NýGGJ TINGSETA
*Heini í Skorini*

Óli Breckmann væntar ársins fíggjarlóg at gerast ein tungur burður, har nógv hugsjónarlig og prinsipiell mál vera á skránni.

- Fyrst og fremst vera fleiri lógir, sum skulu endurskoðast. Arbeiðsmarknaðarlógirnar, lógin um vinnuligan fiskiskap, broyting í fígging av alivinnuni umframt eitt so lítið búskaparligt mál sum jarðarlógir vera ovarlaga á breddanum, sigur Óli Breckmann.



*Óli Breckmann metir yvirtøkurnar og eldraøkið vera høvuðsmál komandi árið*

### Yvirtøkur eingin trupulleiki

Umframt hetta nevnir formaður Fólkafloksins framhaldandi yvirtøkurnar sum eitt høvuðsmál samgongunnar.

- Yvirtøkurnar fara ikki at skapa rumbul, tí har stendur samgongan saman, meðan andstøðan setist aftur, slær Óli fast. Hann er tó ikki heilt nøgdur við tann hátt, fleiri tjóðveldismenn hava yvirtikið seinnu árini.

- Fólkafloksmenninir hava higartil yvirtikið eitt mál fyri og annað eftir uttan stórvegis hóvasták, meðan tjóðveldismenn støðugt skulu skapa rumbul og stríð, hvørjaferð ein yvirtøka skal fremjast, og hetta elvir als ikki til nakað konstruktivt, heldur Óli Breckmann um samgongufelagar sínar.

### Fáa skil á pensjónirnar

Eitt gamalt og slitið orð í føroyskum politikki er eftirhondini pensjónsmál. Óli Breckmann vónar tó, at løgmaður í nýggju tingsetuni fær tryggjað eldra ættarliðið við eini brúkbarari pensjónsskipan.

- Skil má fáast á eldraøkið. Eftir okkara tykki er ein møgulleiki við lóg at útvega eina samansparing á 10% av útgoldnu lønini upp til umleið 200.000 krónur, og á henda hátt varð eldra ættarliðið tryggjað, er uppskotið frá formanni Fólkafloksins.

### Rumbul við kommunumálum

Stríðsmálini og harðastu orðadráttirnir fara sambært Óla Breckmann m.a. at vera um, hvat kommunurnar skulu umsita og ikki. Ætlanin er, at kommunurnar skulu yvirtaka nøkur málsøki frá 1. januar 2004.

- Eftir hvat skilst tykjast kommunurnar ikki vera serliga glaðar fyri ætlanina at koyra ymisk mál yvir á tær. Hetta er ein trupulleiki, nógv stríð væntandi stendst av, og tað verður eisini ein høvuðsavbjóðing, endar Óli Breckmann.